

nærkast hvørjum øðrum og gerast sterkari.

Ein liður í hesum ætlanum var samkomudagurin, vit høvdu í skótahúsinum við Løkin í Runavík.

Karmarnir vóru teir bestu, og veðrið var av tí allarfagrasta henda leygardagin 7. september.

Bæði børn og vaksin hugnaðu sær við spæli, práti og bara samveru og hugna.

Tað er altíð gott við mati, og vit kunnu skjótt blíva samd um, at tað var tað nokk av.

Vit høvdu bjóðað Dianu at koma at dansa við okkum. Vit føroyingar hava eitt sindur ringt við at røra og úttrykkja okkum, kanska serliga inni í samkomunum. So tí var tað gott at fáa loyst eitt sindur upp fyri dansinum.

„Har sum andi Harrans er, er frælsi“ lesa vit í 2. Kor. 3:17, og tað frælsi ynskja vit, skal forloysast meir og meir í okkara samkomu.

Gleðiligt var, at so nógv høvdu sett dagin av til samanhaldið, og halda vit, sum skipaðu fyri, at tað eydnaðist sera væl.

Vit takka fyri ein deiligan dag, og gleða okkum til næstu ferð.

*Nomi*



# Filadelfia

*„Himmal á jørð“*

## Samkomudagurin





*Verið øll samsint, samlíðandi, elskið brøðurnar, verið miskunnsom, eyðmjúk! Lønið ikki ilt fyri ilt ella háð fyri háð, nei, tvørtur ímóti, signið!*

*Tí tað vórðu tit kallað til – at tit skulu arva signing* 1.Pæt.3:8

Vit hava í samkomuni tosað og hoyrt nógv um at styrkja relatiónir hvør við annan. At koma nærri at hvørjum øðrum, og koma at kennast betur. Nógv er sett í gongd fyri at fáa hetta at eydnast, og samstundis merkja vit, hvussu vit

# OKTOBER 2024

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mikudagur | 2. | Kl. 10.00<br>Kl. 18.30 | **Bøn** Ábyrgd/leiðari: Anna<br>**Barna- og ungdómsarbeiði**<br>Ábyrgd: Nomi A. Arge |
| Leygardagur | 5. | | **Reingerð:** Karin og co. |
| Sunnudagur | 6. | Kl. 11.00<br>Kl. 11.30 | **Morgunmøti v. breyðbróting**<br>**Barnamøti**<br>Møtivertar: Kári, Dávid og Nora<br>Ábyrgd/Leiðari: Anna<br>Lovsongsleiðari: Nomi, bólkur I<br>Uppvørpa: Ása Elisabeth<br>Ljóðbland: Tummas D.<br>Tulkur: Linda Maiken<br>Talari: Mariann<br>Kaffivertar: Kári, Dávid og Nora |
| Mánadagur | 7. | Kl. 20.00 | **Bønarskúlin**<br>Ábyrgd/leiðari: Anna-May |
| Mikudagur | 9. | Kl. 10.00 | **Bøn** Ábyrgd/leiðari: Anna |
| Leygardagur | 12. | | **Reingerð:** Ingun og co. |
| Sunnudagur | 13. | Kl. 11.00<br>Kl. 11.30 | **Morgunmøti**<br>**Barnamøti**<br>Møtivertar: No-omi, Marner, Hellen og Sjúrður<br>Ábyrgd/leiðari: Ása O.<br>Lovsongsleiðari: Tummas J., bólkur II<br>Uppvørpa: Ragnar<br>Ljóðbland: Sjúrður<br>Tulkur: Ragnar<br>Talari: Alex<br>Kaffivertar: No-omi, Marner, Hellen og Sjúrður |
| Mánadagur | 14. | Kl. 20.00 | **Bønarskúlin**<br>Ábyrgd/leiðari: Anna |
| Mikudagur | 16. | Kl. 10.00<br>Kl. 18.30 | **Bøn** Ábyrgd/leiðari: Anna<br>**Barna- og ungdómsarbeiði**<br>Ábyrgd: Nomi A. Arge |
| Leygardagur | 19. | Kl. 10.00 | **Reingerð:** Anna og co. |
| Sunnudagur | 20. | | **Nærri Klaksvík** |
| Mánadagur | 21. | Kl. 20.00 | **Bønarskúlin**<br>Ábyrgd/leiðari: Regin |
| Mikudagur | 23. | Kl. 10.00 | **Bøn** Ábyrgd/leiðari: Anna |
| Hósdagur | 24. | Kl. | **Hugnakvøld fyri kvinnur og ungar gentur** |
| Leygardagur | 26. | | **Reingerð:** Conny og co. |
| Sunnudagur | 27. | Kl. 11.00<br>Kl. 11.30 | **Morgunmøti**<br>**Barnamøti**<br>Møtivertar: Eyðbjørg og Áshild<br>Ábyrgd/Leiðari: Anna-May<br>Lovsongsleiðari: Nomi, bólkur II<br>Uppvørpa: Jóel<br>Ljóðbland: Sjúrður<br>Tulkur: Høgni<br>Talari: John H. Johansen<br>Kaffivertar: Eyðbjørg og Áshild |
| Mánadagur | 28. | Kl. 20.00 | **Lovprísan og forbøn**<br>Ábyrgd/leiðari: Hildibrandur |
| Mikudagur | 30. | Kl. 10.00<br>Kl. 18.30 | **Bøn** Ábyrgd/leiðari: Anna<br>**Barna- og ungdómsarbeiði**<br>Ábyrgd: Nomi A. Arge |

Fyrivarni verður tikið fyri, at broytingar kunnu koma í skránna.

# Heystmøtir 1.-3. november



Aftur í ár hava vit heystmøtir, og vit fáa vitjan av Wayne og Gwendu Simmonds, sum koma at tæna samkomuni. Tað er ein stór gleði at hoyra Wayne og Gwendu, sum longu hava vitjað okkum fleiri ferðir. Wayne, sum er stovnari av Transformation Bible School, ferðast nógv í Evropa og hevur bíbliuskúla saman við konu síni, og soleiðis eru tey við til at styrkja samkomuna á staðnum. Tey eru upprunaliga úr Wales, og hava upplivað nakrar av vekingunum í Wales, tey eru nú búsitandi í Danmark.

## STUÐLA ARBEIÐINUM HJÁ FILADELFIA

Um tú ynskir at stuðla arbeiðinum hjá Filadelfia, kanst tú flyta pening á konto í Betri nr. 9181 495 353 5

Tú ert vælkomin at viðmerkja á flytingina um tað er tíggjund, gáva ella annað. Takk fyri! *Samkomuleiðslubólkurin*